**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Vit pensionistar – Hondina á hjartað – Eiga vit ikki at taka í egnan barm?



TÍÐARGREININ
*Pauli Ellefsen*

Tað var áhugavert at síggja myndirnar av øllum teimum pensionistunum, sum í fleiri umførum hava leitað sær inn í løgtingið at mótmæla niðurskurðirnar av játtanum til okkum pensionistar.

Ongin ivi er um, at tað er torført at fáa fíggjarlógina at hanga saman aftan á tann álvarsliga niðurskurðin av blokkinum og tann búskaparpolitikk, sum førdur er seinastu árini. Og sjálvsagt kann ein altíð tosa um, og hava ymiskar meiningar um, tær av løgtinginum gjørdu raðfestingar. Um tað er rímuligt, at Anfinn og hansara grannar fáa eitt nýtt berghol, soleiðis at teir kunnu koyra gjøgnum tvey ymisk berghol, alt meðan pensionistarnir missa eina røð av sjálvsøgdum rættindum.

**Er tað ikki júst vit, pensionistar, sum hava skyldina?**
Hyggjandi eftir hesum vøkru føroysku pensionistunum á áhoyraraplássunum á løgtingi setti eg mær hendan spurningin. Eru tað ikki júst vit, sum nú eru pensionistar, sum hava ábyrgdina av, at tað er so torført at fáa fíggjarlógina at hanga saman? Eiga vit ikki at taka í egnan barm?

Hava ikki meira enn tveir triðingar av føroysku pensionistunum sett Javnaðar-, Fólkafloks-, Tjóðveldis- og onnur loysingarfólk inn á ting? Og hava hesir løgtingslimir ikki gjørt júst tað, sum teir lovaðu at gera og støðugt hava gjørt – at vaksa um útreiðslurnar og minka um inntøkurnar á fíggjarlógini?

Trúðu vit veruliga, at loysingarflokkarnir megnaðu bæði at vaksa um útreiðslurnar, við yvirtøkum og nú eisini við egnum uttanríkisráði við »ambassadum«, egnum universiteti oman á ein vónleysan fólkaskúla o.s.fr. o.s.fr. og samstundis eisini at skera blokkin næstan niður í helvt, uttan at hetta kom at ganga út yvir bæði pensionistar og aðrar føroyingar?

T. d. hava hesir flokkarnir eftir heilt fáum árum skolað nærum tríggjar milliardir krónur – ella nærum trý túsind milliónir krónur - út gjøgnum »lensiportrini«. Hetta er peningur, sum okkara forfedrar samráddu seg til, og tí mátti sigast at vera fólksins ogn.

Tá ein hugsar um, at allir føroyskir pensionistar ikki kunnu fáa nakrar fáar krónur at hugna sær við, og tá ein hugsar sær til, at vit longu nú ikki hava ráð til at »vaksinera« tær trettan/fjúrtan ára gomlu smágenturnar móti deyðiligari sjúku, sum ivaleyst førir við sær, at summar av teimum seinni doyggja frá børnum og manni. Tá høvdu trý túsind milliónir krónur hjálpt eitt sindur.

**Vóru tær trý túsind milliónirnar ikki betri farnar?**
Kundu vit ikki heldur havt nýtt hesar trý túsind milliónirnar til m.a. at bøtt um heilsuverkið, almannaøkið og skúlaøkið? Í luftbornu fjølmiðlunum og í bløðunum síggja, hoyra og lesa vit dagliga um eina røð av álvarsligum trupulleikum, sum vanligi føroyingurin stríðist við. Bæði raskir og sjúkir pensionistar liva undir óvirðiligum umstøðum. Heilsuverkinum tørvar bæði manning, viðlíkahaldsarbeiði og arbeiðsamboð. Tørvurin á røktarheimsplássum er ovurstórur. Skúlanum tørvar skúlabøkur og nógv annað. Í mínum uppvøkstri var føroyski bygdaskúlin betri enn tilsvarandi danskur skúli. Karakterirnir á realpreliminer- og studentaskúlanum vóru sagdir at liggja hægri enn teir donsku, mettir av somu donsku próvdómarum. Í dag liggja vit í botninum, borð um borð við Mexico, meðan fleiri og tríati lond liggja aftan fyri danir, men framman fyri okkum. Orsøkin er fyrst og fremst tørvandi peningur.

**Fullveldið førir sjálvsagt sakn og líðingar við sær**
Sjálvandi verða vit pensionistar noyddir til at góðtaka tey sakn og tær líðingar, sum fullveldið má og skal føra við sær. Vit hava sjálvir arbeitt okkum fram til verandi støði.

Tá eg møti fólki, byrja tey, sum vera man, ofta at tosa um politikk. Nógv kenna trongd til at siga mær, hvønn tey hava valt, kannska serliga tey sum ikki hava valt sum eg. Ofta havi eg hoyrt pensionistar, eisini onnur, siga: Eg havi altíð valt og velji Javnaðarflokkin, men eg eri hart ímóti loysing. Onnur siga: Eg havi altíð valt og velji Fólkaflokkin, men gangi slettis ikki inn fyri loysing.

Tað sum undrar meg mest, er at tey ikki annars bera brá av Alzheimer ella demens av øðrum slagi. Tey hava kannska bara »fortrongt«, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, við vælsignilsi frá Javnaðarflokkinum, fyri stuttum upp á tað nærmasta hertóku Keypmannahavn fyri at fáa loysing og fullveldi.

Aftan á sjálvskaptu fíggjarkreppuna í hálvfemsunum rýmdu umleið sjey túsind føroyingar, nógv teir flestu høvdu valt loysingarflokkarnar. Teir rýmdu úr Føroyum undan politisku úrslitum loysingarmanna at leita sær annað og betri skjól – í Danmark av øllum londum. Einstakir halda fram við, úr teirra tryggu donsku holu, at rópa upp um føroyskt fullveldi.

**Men vit hava ikki nær til fingið fullveldið enn**
Vit eiga at minnast til, at vit slettis ikki enn hava fingið tað hálovaða fullveldið. Vit eru ikki ein gang komin inn í forgarðin. Meðan vit hava blakað burtur tær nevndu trý túsind milliónirnar, hava vit um somu tíð fingið nógv meira enn fýra túsind milliónir krónur í blokkstuðuli. At blokkurin enn kemur hvørt ár við seks hundrað milliónum krónum merkir, at hesin í ár minkar hallið á fíggjarlógini við somu seks hundrað millónum, soleiðis at hallið í ár vónandi bert verður einar sjey til otta hundrað milliónir krónur tá avtornar.

Hetta er støðan, áðrenn fíggjarkreppan havur rakt okkum. Tað eru bert tveir mánaðir síðan, at landsbankastjórin helt, at fíggjarkreppan ikki kom at ávirka okkum. Vónandi hevur hann grein í sínum máli. Eg havi hug at siga sum norðmaðurin plagar at taka til. »Den lurer jeg på«.

**Um danir tóku okkara loysingarmenn í álvara**
Hugsa vit okkum, at danir fyri fáum árum síðan vóru »rationellir«, »konsekventir« tá Anfinn Kallsberg, Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal við stórum fylgi, íroknað filmsfotografar, lupu á Christiansborg. Um danir tóku tey í álvara og søgdu: Nú tíma vit ikki at hoyra meira grenj, møsn og fleiri skuldsetingar frá føroyskum loysingarmonnum í okkara egna parlamenti. Tit fáa loysingina.

So tosaðu vit ikki í dag um mistar trý túsind milliónir krónur, sum vit nú fáa alt meira tørv á, men um sjey til otta túsind mistar milliónir krónur. Hvussu støðan so hevði verið í dag hjá okkum, sum ikki høvdu leitað okkum annað skjól, men enn búleikaðust heima á landi, tað er tað bert ein sum veit.

**Er ongin vón?**
Um tann flokkur, sum eg plagdi at velja, ikki tey seinastu sjey árini viljaleysur hevði »fylgt við tíðini«, og tí er vorðin »toppmodernaður«, hevði eg verið førur fyri at víst á eina »klokkuklára« loysn av trupuleikunum.

*Trúðu vit veruliga, at loysingarflokkarnir megnaðu bæði at vaksa um útreiðslurnar, við yvirtøkum og nú eisini við egnum uttanríkisráði við »ambassadum«, egnum universiteti oman á ein vónleysan fólkaskúla o. s. fr. og samstundis eisini at skera blokkin næstan niður í helvt, uttan at hetta kom at ganga út yvir bæði pensionistar og aðrar føroyingar?*

*Um tann flokkur, sum eg plagdi at velja, ikki tey seinastu sjey árini viljaleysur hevði »fylgt við tíðini«, og tí er vorðin »topp-modernaður«, hevði eg verið førur fyri at víst á eina »klokkuklára« loysn av trupuleikunum*

*At blokkurin enn kemur hvørt ár við seks hundrað milliónum krónum merkir, at hesin í ár minkar hallið á fíggjarlógini við somu seks hundrað millónum, soleiðis at hallið í ár vónandi bert verður einar sjey til otta hundrað milliónir krónur tá avtornar*



*»Eru tað ikki júst vit, sum nú eru pensionistar, sum hava ábyrgdina av, at tað er so torført at fáa fíggjarlógina at hanga saman? Hava ikki meira enn tveir triðingar av føroysku pensionistunum sett Javnaðar-, Fólkafloks-, Tjóðveldis- og onnur loysingarfólk inn á ting«, spyr Pauli Ellefsen í tíðargrein í dag*